# Lítli Snar

Hvør er hasin, ið situr har?
Tað er eingin annar uttan Lítli Snar.
Aldrin í verðini, nei ongantíð,
sást tú ein lítlan hund sum so synd var í.
Stór er sorg og sút,
hann er koyrdur út,
bukaður við snørinum, sum hevur stóran knút.

Gamla Anna eigur ongan mann,
tí var hon so ógvuliga góð við hann.
Drakk bara róma, át køkur uttan tal,
sukur og annað sum smakkar væl.
“Lítli, fitti Snar,
eingilin hjá mær.
Alt tað besta, sum er til, tað skal eg geva tær.”

Gamla Anna hevur einaferð átt,
ein dýran vása og ein urtapott.
Hvørgan teirra hon eigur meir,
tí Snar hevur brotið teir báar tveir.
Tá var Anna óð. –
Men hon var grumm og sló,
tá Snar hann lyfti beinið upp, har beint sum prestur stóð.

Ja, flongdur var hann og situr nú har,
og gamla Anna segði: “Ljóti Snar!”
Men Snar skilir ikki, hví hon sigur tað,
tí hann hevur einki petti ljótt gjørt í dag.
Tó alt tað sama ger,
so illur Snar nú er,
ætlar sær at rýma út í stóru, køldu verð!

So kann gamla Anna hava tað so gott,
sova aleina hvørja einastu nátt.
So kann hon angra og taka sær nær,
at hon var so ill við lítla Snar.

Men fjálgt er innan tjøld,
og verðin hon er køld,
og nú er eingin dagur meir, men myrkur, regn og kvøld.

Ongar køkur at eta sær,
og eingin rómi til lítla Snar.
Oyruni hanga, tað dryppar úr teim,
halan millum beinini, hann spelar títtur heim.
Vátt er hár og skinn,
tár ber hann á kinn:
"Gamla Anna, lat nú upp, tí Snar vil sleppa inn."

"Aldrin aftur í verðini
skal Snar vera ljótur og gera fortreð,
aldrig bíta kettuna – og ikki gera vátt,
og aldri bróta vása ella urtapott.
Men tú mást skunda tær,
tí nú er synd í mær,
Og brátt so eigur gamla Anna bert ein frystan Snar."

*Mourits Mohr (1918-1956)*
*Mourits var av Sandi, lærari. Mourits gjørdi vart við seg í ungmannafelagsarbeiði í Virkinum á Sandi og í Merkinum í Tórshavn. Hann skrivaði skemtileikir og yrkti tættir, men kendastur er hann fyri at hava skapað hjúnini "Læars og Annu Lenu", sum varð prentað í Følv at kalla á hvørjum ári frá 1943-55.*